ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 24. mars 2010

# Stjørnan glampaði



Stjørnan var klassar betri enn Tjaldur í fyrstu FM-finaluni í gjárkvøldið og er nú uppaftur størri stórfavorittur at vinna føroyameistaraheitið
Mynd: Álvur Haraldsen

**Í gjárkvøldið var stórt sæð bara eitt lið á vøllinum, tá Stjørnan vann ein knúsandi stórsigur á Tjaldri í fyrstu FM-finaluni hjá kvinnunum**



einstein@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Tað var bara fyrsta korterið av dystinum, at bæði liðini vóru inni í dystinum. Støðan 9-7 til Stjørnuna stóð á talvuni á endavegginum í ítróttarhøllini í Runavík í næstan 10 minuttir, tí tað stóð stilt hjá báðum pørtum.

Hetta var í grundini avgerandi løtan, tí tað var serliga Tjaldur, ið brendi stórar møguleikar, meðan Stjørnan heldur ikki fekk nakað burtur úr sínum. Men tá so hol aftur kom á, var tað Stjørnan, ið streyk avstað, og restina av fyrra hálvleiki vunnu klaksvíkskvinnur 6-2 – og so vendist ikki aftur.

Í seinna hálvleiki koyrdi tað bara víðari hjá Stjørnuni, ið skifti fólk dúgliga, uttan at tað gekk út yvir dominansin, ið var øgiligur inni á vøllinum. Her gekk sjón fyri søgn, at breiddin hjá Stjørnuni ger allan munin, tí uttan allar útlendingarnar megnaði Tjaldur slett ikki at hótta.

### Málini einki at siga

Nú kann so alt verða avgjørt í annaðkvøld klokkan 19, tá Stjørnan tekur ímóti í KÍ-høllini, tí eydnast Stjørnuni at vinna tá, er føroyameistaraheitið komið aftur til Klaksvíkar, eftir at tað síðsta árið hevur verið heimahoyrandi í Runavík.

Hinvegin, so hevur Tjaldur, sum í gjárkvøldið tapti við 14 málum, ikki brúk fyri at vinna við 15 málum, tí málini hava einki at siga í samlaða roknistykkinum, har bara sigurin telur.

Tað vil siga, at um Tjaldur vinnur við bara einum máli í annaðkvøld, skal ein triðja finala spælast, tí tá stendur 1-1 í dystum. Endar dysturin hinvegin við javnleiki, er Stjørnan eisini meistari, tí spælt verður best av tveimum dystum.

Satt at siga, so er Stjørnan eftir dystin í gjárkvøldið uppaftur størri stórfavorittur at vinna meistaraheitið, tí skal Tjaldur koma afturíaftur eftir henda stóra lúsingin, kemur tað at teljast millum sensatiónirnar í føroyskum kvinnuhondbólti!

## FAKTA

**Tjaldur-Stjørnan 17-31 (9-15)**
**10 min:** 5-6
**20 min:** 7-9
**40 min:** 13-20
**50 min:** 15-26
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 9 (2), Annika Thomsen 5 (1), Heidi á Lakjuni 2, Jóhanna í Króki 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 9 (1), Durita Christophersen 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Judit Hansen 3, Durita Ljósstein 3, Una Olsen 3, Ella Petersen 2 (1), Anna Kristina Samson 2, Durita Mikkelsen 1, Valentina Suciu1
**Brotskøst:** Tjaldur 4, Stjørnan 4
**Útvísingar:** Tjaldur 5, Stjørnan 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

## Ordiliga stuttligt

Meðan spælararnir hjá Tjaldri sleikja síni sár, fegnast kvinnunar hjá Stjørnuni um stóra sigurin í gjárkvøldið, ið gav Stjørnuni best hugsandi útgangsstøði undan næsta finaludystinum, sum verður í Klaksvík í annaðkvøld.

– Vit hava ikki torað at trúð, at Tjaldur veruliga var viknað so nógv, sum úrslitini hjá teimum í síðstuni hava bent á, so tí vóru vit ordiliga klárar, tá vit fóru á vøllin í Runavík, sigur høgri vongur hjá Stjørnuni, Durita Christophersen.

– Eg haldi, at hesin dysturin staðfesti, at vit hava eina størri breidd enn Tjaldur, tí sjálvt um vit skiftu nógv út, so allar sluppu at spæla, mistu vit ongantíð takið, men kláraðu at halda munin alla tíðina.

Durita, sum hevur mist fleiri dystir í vetur, tí hon hevur verið skadd og eisini hevur verið til skips, var sera fegin um finaludystin í gjárkvøldið:

– Ja, tað var ordiliga stuttligt at spæla, og vit gleða okkum til hóskvøldið. Kanska tann dysturin ikki verður so ójavnur, tí eftir dystin vóru tað onkrir av áskoðarunum hjá okkum, ið høvdu hug at gremja seg um, at til síðst var spenningurin ov lítil, sigur hon.

hil

## Vit taptu í verjuni

– Vit komu ongantíð ordiliga í gongd í verjuni, og tað sást aftur í álopinum. Tað er fyrst og fremst í verjuni, at vit tapa dystin, staðfesti málverjin hjá Tjaldri, Guðrun í Lágabø, eftir dystin í Runavík í gjárkvøldið.

– Og sjálvt um allir tríggir málverjarnir hjá Tjaldri komu inn, megnaði eingin av okkum at steðga Stjørnuni. Tað sigur eisini seg sjálvt, at eingin klárar at standa einsamallur í málinum. Soleiðis var tað fyri tað nógva, tí verjan riggaði so illa hjá okkum.

Guðrun í Lágabø helt eisini, at tekniskir feilir kostaðu dýrt, tí Stjørnan var beinanvegin yvir Tjaldursspælarunum og revsaði øll mistøkini hart.

– Í hinum endanum skutu vit á málverjan ella við síðuna av, so einki er at siga til, at vit taptu. Tær spældu so øgiliga nógv betri enn vit, og at tað blivu 14 mál á muni, fortelur væl alt, sigur málverjin, ið tó velur at halda høvdið høgt undan dystinum í annaðkvøld.

– Vit ætlaðu sjálvandi ikki at tapa í kvøld, og tað ætla vit heldur ikki, tá vit fara til Klaksvíkar. Men skulu vit vinna, so krevst fyrst og fremst, at vit eru nógv meira ágangandi í verjuspælinum.

hil